ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tvøroyrar kommuna
Postboks 80
800 Tvøroyri

16. juli 2014
Mál: 14/00428-5
Tygara skriv:
Viðgjørt: HE

# Viðtøkur fyri javnbjóðis samstarv

**millum Sumbiar-, Vágs-, Porkeris-, Hovs-, Fámjins-, Tvøroyrar- og Hvalbiar kommunur.**

### § 1. Heimild

Við heimild í § 5 í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hevur landsstýrismaðurin í almanna- og kommunumálum tikið avgerð um at skipa heimatænastu, eldrarøkt v.m. í Suðuroynni. Samstarvið verður skipað sambært:

- Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (LL 19)
- Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (LL 20)
- Løgtingslóg nr. 31 frá 14. apríl 2014 um ávís starvsfólkaviðurskifti, tá heimatænastan, eldrarøktin v.m. verður løgd til kommunurnar at umsita (LL 31)

### § 2. Heiti

Heitið á samstarvinum er 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy'.

### § 3. Stýri

Eitt stýri verður valt at fyrisita 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy'. Stýrið verður skipað sambært § 7, stk. 1-4 í LL 20.

*Stk. 2.* Stýrið verður valt fyrstu ferð sum skjótast eftir, at viðtøkurnar eru staðfestar og í seinasta lagi 1. september 2014. Stýrið situr valskeiðið út.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

*Stk. 3.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni. Ein av borgarstjórunum í samstarvinum skal verða formaður.

*Stk. 4.* Annars verður stýrið valt eftir kommunuval, og situr valskeiðið. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

*Stk. 5.* Leiðarin fyri 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy' er skrivari og førir gerðabók. Skrivarin hevur ikki atkvøðurætt.

*Stk. 6.* Stýrið fær samsýning sambært galdandi reglum um samsýning til kommunustýrislimir.

*Stk. 7.* Stýrið hevur avgerðar- og setanarmyndugleikan á økinum.

**§ 4. Skipan av økinum og staðseting**

Heimatænastan, eldrarøktin v.m. verður løgd út í verandi bygnaði, við staðseting í Vági.

*Stk. 2.* Øll starvsfólk innan heimatænastu, eldrarøkt v.m. í øki 5 fylgja við útleggingini. Økisleiðarin í øki 5 verður leiðari fyri 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy'.

*Stk. 3.* Leiðsla og ábyrgd av 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy' – fíggjarliga, umsitingarliga, starvsfólkaliga og fakliga – er sambært niðanfyristandandi bygnaði:

1. Stýrið, valt av luttakandi kommunum
2. Stýrisformaður, valdur av stýrinum
3. Leiðarin, settur av stýrinum
4. Stýrið kann geva leiðaranum heimild til at seta og loysa onnur fólk úr starvi

*Stk. 4.* Samstarvið nýtir KT-tænasturnar, sum landið bjóðar og verða viðurskiftini viðvíkjandi roknskapi og KT-tænastum avtalað nærri í: "Sáttmála um tænastustig av roknskapar- og kt-tænastum millum landið og samstarvið" (SLA).

**§ 5. Visitatión og upptøka**

Visiterað verður til allar tænastur og veitingar, sum veittar verða sambært LL 19.

*Stk. 2.* Visitatiónin verður skipað við fakligari visitatiónseind, sum verður mannað við hóskandi fakligum førleikum.

*Stk. 3.* Visitatión til tænastur og veitingar verður gjørd skrivliga.

*Stk. 4.* Til at viðgera og taka støðu til visitatión um búpláss, umlætting og døgnrehabilitering kann verða sett ein upptøkunevnd. Leiðarin í 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy' er formaður í upptøkunevndini. Nevndin kemur til felags niðurstøðu sambært fakligari tørvsmeting. Um tað skuldi hent, at semja ikki fæst, tekur leiðarin avgerð.

**§ 6. Fíggjarviðurskifti**
Fíggjarárið hjá 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy' er frá 1. januar til 31. desember.

*Stk. 2.* Formaðurin skal áðrenn 1. september leggja uppskot til fíggjarætlan til stýrið. Stýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir. 1. viðgerð skal verða áðrenn 1. oktober, soleiðis at avleidda gjaldið hjá kommununum í samstarvinum samsvarandi § 10 í LL 20 kann takast við í fíggjarætlanarviðgerð teirra. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt skjótast til ber aftaná, at kommunurnar í samstarvinum hava samtykt sínar fíggjarætlanir.

*Stk. 3.* Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum.

*Stk. 4.* Útreiðslurnar av 'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy' verða, sambært § 10 í LL 20, býttar millum kommunurnar samsvarandi við talið av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri.

*Stk. 5.* Fyri at fremja íløgur á økinum, skal hetta verða samtykt av einum meiriluta av stýrislimunum, ið samstundis umboða ein meiriluta av fólkatalinum í kommununum 31. desember árið frammanundan.

**§ 7. Ognarviðurskifti**
Ognarviðurskiftini verða óbroytt. Stýrið skal gera avtalur við ognarkommunurnar um leigu av bygningum, soleiðis at ognarkommunurnar verða hildnar skaðaleysar.

*Stk. 2.* Stýrið skal taka støðu til, hvat skal henda við sjálvsognarstovninum og rakstrinum av Suðuroyðar ellis- og røktarheimi á Tvøroyri.

*Stk. 3.* Kommunurnar kunnu tó skipa ognirnar sum felags ogn, treytað av neyðugum góðkenningum.

**§ 8. Roknskapur og grannskoðan**
'Bú- og Heimatænastan í Suðuroy' hevur sjálvstøðugan roknskap, sum verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara, sum stýrið velur. Samstarvið skal annars fylgja ásetingunum í kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.tíl.

*Stk. 2.* Í seinasta lagi í apríl mánað verður grannskoðaður ársroknskapur fyri árið frammanundan lagdur fyri stýrið og kommunustýrini.

**§ 9. Eftirlit**
Eftirlit verður skipað í millumkommunalum samstarvi eftir kunngerð sbr. § 19, stk. 3 í LL 19.

**§ 10 Gildiskoma og broytingar í viðtøkunum**

Viðtøkurnar koma í gildi tá landsstýrismaðurin hevur staðfest tær.

*Stk. 2*. Broytingar í viðtøkunum kunnu fremjast á sama hátt sum samstarvsavtalur, sí § 11, stk. 2 í LL 20.

Annika Olsen

landsstýriskvinna

/Johnhard Klettheyggj

leiðandi løgfrøðingur